Hetta er ikki Skálafjørðurin - í hvussu er ikki enn - men Cromarty Firth í grannalagnum Skotlandi.

# Boripallar í vetrardvala á skotskum firði

**Jan Müller**

20.10.2015 - 13:42

Oljan.fo

Nú veturin nærkast hava fleiri borifeløg gjørt av at leggja nógvar av sínum oljupallum á trygt stað. Eitt av hesum tryggu "hvíldarstøðum" ella parkeringsplássum er Cromarty Firth fjørðurin nær Invergordon  í Skotlandi.

Millum pallarnar, sum eru lagdir fyri veturin og sum verða umvældir um somu tíð,  er eisini tann risastóri West Phoenix, sum vit eisini kenna í Føroyum. Samlaða talið av pallum á fjørðinum er 11 higartil. Leita vit bert nøkur ár aftur í tíðina, tá oljuprísurin var  høgur og nóg mikið var at gera, tá var tað sera sjáldsamt at síggja so nógvar pallar á slíkum firðum í longri tíð. Cromarty Firth fjørðurin hevur verið brúktur sum parkeringspláss hjá oljupallum líka síðani, at oljuøldin tók seg upp her fyri meira enn fimti árum síðani.

Bob Buskie, frá  Port of Cromarty Firth, sigur við skotskar miðlar, at teir í løtuni hava 12 pallar á fjørðinum, og at tað er pláss fyri seks aftrat. Nakrir av pallinum liggja so har og bíða eftir at fáa pláss til umvælingar í antin Invergordon ella Nigg skipasmiðjunum.

Hann vísir á, at ringu tíðirnar í oljuvinnuni við minkandi leitivirksemi hava gjørt, at nógvir av pallunum eru uttan arbeiði og tí vera teir lagdir. Hetta er støðan í Norðsjónum sum heild. Buskie sigur víðari, at Cromarty Firth er eitt sera gott stað at hava pallar liggjandi í slíkum tíðum, bæði tí at dýpið er tað rætta og trygdin er góð.